# fólk í Kongo

marching in" varð improviserað. Tað var flott at hoyra Ettu sláa seg púra leysa, og Vox megnaði væl at fylgja við,

Etta Cameron er sera fangandi á pallinum, tí at hon hevur eina sterka útstráling. Hon livir seg fult út inn í sangin. Hon tykist eisini at vera eyðmjúk. Tó megnar hon at bera framførsluni.

Áhoyrararin fekk veruliga álit til Ettu, tá ið hon gekk út millum fólkini og heilsaði uppá tey, meðan hon sang "We´ll walk hand in hand".

ADRA hevur eina visjón um ein heim, har ið fólk tæna hvør øðrum. Tí varð Etta biðin um at syngja "If I could help Somebody" umaftur, eftir at hon varð klappað upp aftur.

Etta varð klappað upp til enn eitt eykanummar, og tá vóru áhoyrararnir nøgdir. Konsertin var sera góð, og fólk tóktust vera einum máli um, at VOX var líka gott sum Etta, hóast framførslan hjá Ettu var eitt sindur meira eksotisk.



Bjørn Krøll, kunningarleiðari hjá ADRA, greiddi frá arbeiðnum hjá ADRA



*Ein maður frá ADRA við innsavningarkassanum*



*Fólk vóru sera spent uppá at hoyra Ettu Cameron, og hon livdi upp til vónirnar*

